## Hernaðarkvett í Honduras



Støðan er spent í miðamerikanska landinum Honduras, eftir at herurin koyrdi forsetan, Manuel Zelaya, frá og sett hann umborð á eitt flogfar, sum fekk boð um at fara til grannalandi Costa Rica við honum. Hetta er tað fyrsta hernaðarkvettið í Miðamerika síðani kalda kríggið. Manuel Zelaya hevur verið forseti í Honduras síðani 2006. Hann hevurt fleiri ferðir tosað um at broyta stýrisskipanina, so hann kundi fáa eitt valskeið afturat í embætinum. Ætlanin var, at ein fólkaatkvøða um spurningin skuldi byrja í gjár, men ístaðin bleiv forsetin koyrdur frá og av landinum. Grannalondini hava dordømt kvettið í Honduras, og Barack Obama hevur mælt herinum til at virða tær demokratisku reglurnar.

## Siglandi norðan fyri Asia

Orsakað av veðurlagsbroytingunum ber tað nú til at sigla fram við russisku strondini heilt úr Barentshavinum eystur í Kyrrahavið uttan at hava ísbrótara frammanfyri. Tað sigur svenski ævintýrarin Ole Skinnarmo, og hann ætlar sær eisini at prógva, at tað er so. Í síðstu viku fóru hann og eitt altjóða ferðalag undir ta 6.000 fjórðingar longu ferðina við kós ímóti Alaska. Ole Skinnarmo sigur, at tey seinastu árini er tað vorðið 2,7 stig heitari í tí arktiska økinum. Tað hevur gjørt, at ísurin er minkaður so nógv, at tað nú er siglandi fram við sibirisku strondini. Ole Skinnarmo er royndur í póløkinum. Hann var tann fyrsti sviin á Norðpólinum og á Suðurpólinum.

# Stór móttøka fyri Eldborg




**Leygardagin kom stóra og nútímans supply-skipið hjá Supply Service í Leirvík til Føroya. Tíðliga seinnapartin hendan dagin var skipað fyri hátíðarligari móttøku á vestaru bryggju í Havn, har hópur av fólki fekk høvi at síggja skipið**

ELDBORG
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrsta supply-skipið av trimum, sum Supply Service í Leirvík hevur gjørt sáttmálar um at byggja, kom til landið í fagrasta summarveðri seinasta leygardag. Men skipið er ikki bara komið. Tað er eisini farið avstað aftur.

Steðgurin í Føroyum var stuttur, men á ferðini her heima eydnaðist eigarunum at vísa skipið fram, bæði á Skálafjørðinum, í Havn og úti fyri Leirvíkini, har bygdarfólkið hjá høvuðseigarunum kundu síggja skipið úti á vánni.

Sjáldan áður man so nógv fólk hava verið savnað á vestaru bryggju í Havn, sum um 14-tíðina leygardagin, tá Eldborg legði til bryggju, og røður vórðu hildnar.

Eftir røður, navngeving og sang, vórðu fólk boðin umborð at síggja skipið, sum er hitt fyrsta í røðini hjá Supply Service í Leirvík.

Næsta skipið kemur ætlandi seinni í heyst, og gongst sum ætlað, hevur Supply Service trý skip av hesum slag um ikki so langa tíð.

Orógv á fíggjarmarknaðinum hevur tó við sær, at full vissa enn ikki er um triðja skipið. Slík vinna krevur ávísa umsiting, og tí meta tey hjá Supply Service, at raksturin verður skilabetri við fleiri enn einum og tveimum skipum.

Tað var Eydna, kona Tummas Justinussen, sum gav skipinum navn, og í øðrum kasti móti skipssíðuni, fór fløskan í knús.

Osmund Justinussen er nevndarformaður í felagnum, sum eigur Eldborg, og hann var fyrstur á pallin og greiddi frá tilgongdini og gongdini við byggingini av Eldborg.

Varaborgarstóri í Tórshavnar kommunu, Bogi Andreassen, helt røðu, og tað gjørdi Fríðgerð Heinesen, sum áður hevur verið borgarstjóri í Leirvíkar kommunu, eisini.

Eftir formellu móttøkuna, fingu fólk høvi at vitja umborð á Eldborg.




*Tað var hátíðarligt at síggja manningina standa har frammi á bógnum, meðan móttøkan fór fram niðri á bryggjuni*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*